

## Nýggja ráðgevandi nevnd vald

Til tess at fremja lógina um altjóða menningarsamstarv í verki, er ráðgevandi nevnd, sum arbeiðir eftir ásettari fyriskipan. Nevndin hevur formann og fýra limir, sum uttanríkisráðharrin tilnevnir at sita í fýra ára skeið. Tíðarskeiðið hjá sitandi nevnd er runnið og ráðharrin hevur í hesum sambandi tilnevnt fimm nýggjar limir, ið, umframt áhuga í altjóða menningarsamstarvi, hava viðkomandi útbúgving, førleikar og/ella royndir innan økið. Nýggju limirnir í nevndini eru:
Annika Hoydal, ið starvast sum ljósmóður á Landssjúkrahúsinum. Annika Hoydal hevur royndir innan altjóða menningarsamstarv og var útsend fyri Reyða Kross í 2009 og 2010 í Kambodja, sum ráðgevi í heilsuverkætlan.

Heri Kjærbo (myndin), ið starvast sum leiðari á boðanardeildini hjá Heimamissiónini. Heri Kjærbo er upprunaliga bankalærdur og hevur síðani tikið hægri útbúgving í missiologi. Hann hevur átta ára royndir innan trúboðan og hjálpararbeiði í Tansania.

Jens Helgi Toftum, ið starvast sum fulltrúi í Fiskimálaráðnum. Jens Helgi Toftum er útbúgvin fiskivinnufrøðingur og hevur drúgvar royndir innan altjóða samráðingar og nevndararbeiði.

Nicolina Lamhauge, ið starvast sum búskaparfrøðingur og policy greinari hjá OECD í París við m.ø. menningarsamstarvi. Hon er útbúgvin BA í geografi og búskapi og MA í altjóða menningarsamstarvi. Hon hevur harumframt royndir frá felagsskapi í Bangladesj, ið veitir mikrolán.

Tommy Petersen, stjóri í FAS. Tommy Petersen er útbúgvin løgfrøðingur og hevur drúgvar royndir í almennari fyrisiting. Hann hevur harumframt altjóða royndir bæði sum ráðgevi fyri DANIDA og sum føroyskur samráðingarleiðari mótvegis ES.

# Lundaland




Kanningar vísa, at lundin hevur ilt við at lívbjarga sær undir Føroyum

## Í MORGIN

6/9 °C



3-8 m/s 2-7 m/s

Lot til andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

## SUNNUDAGIN

6/7 °C



11-16 m/s 13-18 m/s

Strúkur í vindi upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 4 og 7 stig.

## MÁNADAGIN

5/8 °C



9-14 m/s 5-10 m/s

Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassann vind av suðri og regn. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýstið, 967 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing



**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í landnyrðing úr Íslandi fer norðureftir. Lágtrýstið við Írland fer móti Skotlandi.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 88 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -9 | **Tromsø** | -1 | **Moskva** | -13 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 8 | **Bergen** | -2 | **Berlin** | -6 | **Beijing** | 11 |
| **Tórshavn** | 7 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 20 |
| **Lerwick** | 4 | **Stokkhólm** | -6 | **Madrid** | 15 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 7 | **Keypmannah.** | -4 | **Róm** | 11 | **Sydney** | -- |
| **London** | 8 | **Helsinki** | -19 | **Malorca** | 15 | **New York** | 2 |

## VESTFALLSKYRRINDI

26. mars — Seinna kvarter
2. apríl — Mánin longst frá jørðini
3. apríl — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. apr | 06:04 | 18:23 | 05:04 | 17:23 | 05:19 | 17:38 | 08:04 | 20:23 | 09:04 | 21:23 | 04:19 | 16:38 | 03:19 | 15:38 | 06:19 | 18:38 | 07:19 | 19:38 | 05:49 | 18:08 | 07:04 | 19:23 |
| 2. apr | 06:43 | 19:04 | 05:43 | 18:04 | 05:58 | 18:19 | 08:43 | 21:04 | 09:43 | 22:04 | 04:58 | 17:19 | 03:58 | 16:19 | 06:58 | 19:19 | 07:58 | 20:19 | 06:28 | 18:49 | 07:43 | 20:04 |
| 3. apr | 07:22 | 19:41 | 06:22 | 18:41 | 06:37 | 18:56 | 09:22 | 21:41 | 10:22 | 22:41 | 05:37 | 17:56 | 04:37 | 16:56 | 07:37 | 19:56 | 08:37 | 20:56 | 07:07 | 19:26 | 08:22 | 20:41 |
| 4. apr | 07:59 | 20:18 | 06:59 | 19:18 | 07:14 | 19:33 | 09:59 | 22:18 | 10:59 | 23:18 | 06:14 | 18:33 | 05:14 | 17:33 | 08:14 | 20:33 | 09:14 | 21:33 | 07:44 | 20:03 | 08:59 | 21:18 |
| 5. apr | 08:37 | 20:56 | 07:37 | 19:56 | 07:52 | 20:11 | 10:37 | 22:56 | 11:37 | 23:56 | 06:52 | 19:11 | 05:52 | 18:11 | 08:52 | 21:11 | 09:52 | 22:11 | 08:22 | 20:41 | 09:37 | 21:56 |